**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Sunnudagin kl. 11: Breyðbróting. Týskvøldið kl. 20: Bønar-og uppbyggingarmøti.

**KFUM & K í Klaksvík**
Sunnudagin kl.18.00 Møti við Jákup E. Petersen. Innsavnan til útimissión.

**Getsemane Stangaskákið 1, Klaksvík**
Hvønn gerandismorgun kl.6.15- 7.00 Morgunbøn

**Getsemane, Stangaskákið 1, Klaksvík**
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti
Mánakvøldið kl 20.00 Bønarmøti v/breyðbróting
Hvønn gerandismorgun kl.6.15- 7.00 Morgunbøn

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 18 møti v/ Thomas Juul Askham. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**FAMILJU–TILTAK**
verður í Missónshúsinum í Sumba fríggjakvøldið 16. juli kl. 19.
Koreanskt toymi luttekur við drama o.ø.
YWAM

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl 18.00 møti við luttøku av ungum úr trúarverki, drama, sangur o.a. Øll eru vælkomin.

**Aglow Suðuroy**
Byrjað verður aftur eftir summarsteðgin í seinnu helvt av august.

**Gongutúrur**
Sunnudagin 18. juli verður gongutúrur: Skálabotnur, Oyrarskarð, Oyri. Hetta er ein langur og í støðum tungur túrur. Farið verður frá Kunningarstovuni í Havn kl. 10.00. Havið heit og góð gonguklæðir og ein heitan drekkamunn og matpakka við.
Tilmelding á tlf. 302425 ella torsinfo@torshavn.fo

# Brúdleyp

Leygardagin 17. juli giftast Arndis Andreasen, Tórshavn og Carl Herup Høgnesen, Hoyvík. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 15. Brúdleyp verður fyri innboðin.

Leygardagin 17. juli giftast Beinta Ellingsgaard, Eiði og Jóhan Magnus K. Olsen, Saltnes. Vígslan verður í Nebo á Toftum kl. 12.00. Tey, ið ynskja at gleða okkum, eru hjartaliga vælkomin til vígsluna og móttøku eftir vígsluna. Brúdleyp verður fyri innbodnum í Bakkastovu við Ljósá.

Leygardagin 17. juli kl. 13.00 giftast í Ebenezer Andrea á Dul Mortensen, Argir, og Bjarni Poulsen, Hvalba. Eftir vígsluna verður reseptión, har øll eru hjartaliga vælkomin. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 18.00.

Leygardagin 17. juli kl. 10 giftast í Hoyvíkar Kirkju, Jensa Højgaard Poulsen, Tórshavn og Bjarni Jacobsen, Hósvík. Tey, ið ynskja at gleða okkum eru vælkomin til vígsluna kl. 10 og í hølini hjá Starvsmannafelagnum, J.H. Schrøtersgøta 9, millum kl. 12 og 16.

Leygardagin 17. juli giftast Birita Sørensen, Runavík og Petur á Roykheyggi, Runavík. Vígslan verður í Berøa, Saltangará, kl. 11.00. Eftir vígsluna verður reseption í Sjókaféini frá kl. 12.00 til kl. 14.00. Tey, ið ynskja at gleða okkum á hesum stóra degi eru vælkomin.

Hósdagin 22. juli giftast Sólfríð Maria Johannesen, Sandavágur og Hallur í Rók, Saltnes. Vígslan verður í Fríðrikskirkjuni á Toftum kl. 12.00. Døgurði verður fyri innbodnum í kjallaranum í Tabor á Toftum kl. 17.00 og opið hús verður í miðhæddini í Tabor á Toftum frá kl. 19.30 til midnátt fyri allari familju, vinum og kenningum, sum ynskja at gleða okkum á okkara stóra degi.

Leygardagin 24. juli giftast Guðrun Ólavsdóttir, Strendur og Marius Joensen, Skála. Vígslan verður í Sjóvar kirkju kl. 15. Brúdleyp verður fyri innboðin í Bygdarhúsinum á Strondum kl. 18.30.

Leyardagin 24. juli kl. 12.00 giftast Sara Lundorff Fekih & Hávardur Karlonson Winther í Hoyvíkar kirkju. Øll eru hjartaliga vælkomin til vígsluna og aftaná verður kaffi í kirkjuhølinum. Kl. 17.30 verður veitslan hildin á Hotel Føroyum fyri innbodnum.

24. juli giftast Maja Josenius og David John Whale, Norðragøta. Vígslan verður í Gjáar kirkju klokkan 13. Døgverða verður fyri innboðnum í Høllini, Hotel Hafnia kl. 18. Aftaná kl. 20.30 eru familja, vinir og arbeiðsfelagar hjartaliga vælkomin til eina hugnaløtu í Høllini.

Leygardagin 24. juli kl. 15 giftast í Havnar kirkju Arnbjørg Danielsen, Tórshavn, og John Petersen, Skála. Brúdleyp verður fyri innboðin.

Leygardagin 24. juli kl 15 giftast í Fuglafjarðar kirkju. Palma Abrahamsen Petersen og Jákup Helgi Egholm. bæði ætta úr Fuglafirði búsitandi Runddyssen 300 9230 Svenstrup. Brúdleyp verður fyri innbodnum á Resturant Muntra kl 19.

Leygardagin 24. juli giftast Vivian Tausen og Jens Kjartan Feilberg. Vígslan verður í Fuglafjarðar kirkju kl. 13.00. Veitslan verður hildin á Gjáðargarði kl. 19.00 fyri innbodnum.

Leygardagin 24. juli giftast Eivi Jartrud Klæmintsdóttir úr Norðragøtu og Bárður Holm úr Leirvík. Vígslan verður í Gøtu kirkju kl 14.00. Vælkomst verður á Torbjarnargøtu 15 í Norðragøtu frá kl 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sunnudagin 25 juli giftast Berlys Cañas og Stefan Nordendal. Vígslan verður í Fríðrikskirkjuni á Toftum kl.14. Veitslan verður fyri innboðnum kl. 17. Tey, ið ynskja at gleða okkum á okkara stóra degi, eru hjartaliga vælkomin til opið hús í Kongshavnar Kvinnufelaghúsið á Glyvravegi 625. Glyvrar frá kl. 21.

Sunnudagin 25. juli giftast Turið Johannesen Tórshavn og Ólavur Højgaard Saltangará. Vígslan verður í Glyvra kirkju kl 12.30. Tey ið ynskja at gleða okkum á degnum eru vælkomin til vígsluna og ábit aftná, til kl 19, í heiminum Á Norðurhædd 23, Saltangará.

# Heilsanir





**Góðu Kristina og Saranja**
Hjartaliga tillukku við 4 og 2 ára føðingardøgunum 17. og 18. juli.
**Heilsan omma og abbi á Lýðarsvegi**



**Góða mamma**
Hjartaliga tillukku við útbúgvingini ynskja
**Rebekka og Mirjam**



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara tann 15. august 2009 so hugnaligan og ógloymandi. Hjartans tøkk fyri gávur og heilsanir, og tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til á ymiskan hátt.
**Elin & Johnny**